

## Tøva, seyma og mála í Fuglafirði

Tey, ið kundu hugsa sær at lært gamla hondverkið tøving, og tey, sum hava áhuga í seyming og máling, fáa nú høvi at royna seg í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Hetta er triðja árið á rað, at húsið verður karmur um skapandi skeiðini, sum tær tríggjar, Unn E. Petersen, Randi M. Gunnarsdóttir og Odvør á Lakjuni, skipa fyri. Skeiðini undanfarin ár hava verið so væl umtókt, at fyrireikararnir nú hava valt, at hava tað í trimum umførum, soleiðis at pláss verður fyri fleiri luttakarum. Fyrsta umfar verður í døgunum 2.-4. mei. Skeiðið endar við framsýning, har luttakarar kunnu sína fram tað, sum tey hava latið úr hondum hesar dagarnar. Í góðveðrinum í fjør var framsýningin flutt út á torgið við Mentanarhúsið, og var hon sera væl vitjað.

# Uppvenjing fyri brekað børn



*Anna Maria Antoniussen og Andrea Udvardy Sabroe ynskja at geva føroyskum børnum við breki at fáa endurvenjingar í Føroyum eftir serliga ungarska Petø venjingarháttinum*

**Í hesum døgum fáa 14 føroysk børn, sum hava trupulleikar við at stýra kroppinum, serliga venjing á royndarverkæltan á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Fyriskiparnir vóna at hetta kann verða eitt fast tilboð í Føroyum í staðin fyri at senda børn av landinum**

BØRN OG UNG
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*
*Myndir: Høgni Thomsen*

Seinastu 10 til 15 árini hevur tað almenna fíggjað føroyskum børnum dýrar túrar til Skotlands og Svøríki til sokallaða Petø venjing. Men sum ein royndarætlan verður í hesum døgum skipað fyri venjingarskeiði í Føroyum. Fyriskiparnir eru føroyska Anna Maria Antonioussen og ungarska Andrea Udvary Sabroe,

## Ger nógvan mun

**Børnini síggja út til at stuttleika sær og foreldrini lata væl at venjingarskeiðnum hjá Annu Mariu Anthoniussen.**
**- Sonurin tímir nógv betri, nú tað gongur fyri seg í einum føroyskum umhvørvi, og hann fær nógv meira burtur úr, sigur ein mamma.**



*Aron er sjey ár og er spastiskur í aðrari síðuni. Hann gongur í fyrsta flokki í Eysturskúlanum, og sum hjálp til kropsligu veikleikarnar gongur hann til fysioterapeut eina ferð um vikuna og til ríðing eina ferð um vikuna.*
*Mamman, Rannvá av Húsabrúgv, letur væl at venjingini, men hon er eisini strævin.*
*- Hann er í skúla í Havn um morgunin og til venjing her í Klaksvík seinnapartin, og tað er ikki bara lætt. Men tað hevur verið alt stríðið vert. Tí eg síggi, at tað ger mun. Vinstra hond er nógv meira avslappað nú, og hann fær brúkt hana.*
*Aron situr og venur armstyrki og javnvág við einum pinni, vil vinstra hond ikki ordiliga akta. Men hann blívur við, inntil hann heldur fast um pinnin við báðum hondum. Og so koyrir hann pinnin spakuliga men snórabeint uppeftir. Fyrst upp til nøsina, síðani heilt upp um høvd og so aftur um ryggin.*
*Aron er ein blíður og lívligur drongur, og hann setur futt í hini børnini. Hann hugsar ikki nógv um sín veikleika, men hann hevur brúk fyri at styrkja sína spastisku síðu, og Rannvá av Húsabrúgv sigur, at um hetta verður eitt fast føroyskt tilboð, fer hon avgjørt at gera brúk av tí.*